

Mynd: Álvur Haraldsen

# Uttan at sveitta...

**FÓTBÓLTUR** Trý skjót og løtt mál til NSÍ gjørdu fullkomuliga av við 07 Vestur, sum ongantíð fekk fótin fyri seg. Og um runavíkingar løgdu í, kundu teir óivað vunnið ein væl størri sigur, tí mótstøðan var púrt eingin

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| NSÍ | 9 |
| 07 Vestur | 0 |

Tað var ikki gamalt, at NSÍ vann stórsigrar og skjeyt upp í leypar av málum, men ein slíkur kom til høldar í gjár, tá 07 Vestur vitjaði við Løkin. At enda hevði dysturin so lítið við fótbólt og spenning at gera, at fólk fyri tað nógva stóðu runt vøllin og tosaðu um, um máltalvan mundi klára tvísifrað tøl eisini. Tann spurningurin er enn ósvaraður.

Ein av áskoðarunum, sum var komin allan vegin úr Vágum, helt fyri, at bara dysturin ikki endaði 7-0, kundi hann næstan liva við hvørjum sum helst, tí 7-0 hevði helst gjørt sítt til, sms-boðini í Triðja hálvleiki á Rás 2 høvdu tambað alt tað, sum fantasiurin kann røkka til, tá talan er um at spæla sær við tølini – 07 og 7-0. Vágamaðurin varð spardur fyri hetta.

Satt at siga, so var hetta ein sera løgin fótbóltsdystur at síggja, tí so hvørt sum málini skrambláðu inn, var minni og minni at hyggja at. Alt tos um spenning datt burtur longu mitt í fyrra hálvleiki, og sum tíðin leið, dovnaði alt burtur í einki, og tað ber veruliga til at siga, at henda dystin vann NSÍ uttan at sveitta!

## Avgjørt beinanveg

Byrjanin hjá heimaliðnum var tann allarbesta, tí hol kom á longu í fjórða minutti. Einar T. Hansen smekkaði til og skjeyt beint á Bárð Johannesen, ið varði málið hjá 07 Vestur fyri fyrstu ferð. Bárður fekk ikki hildið bóltinum, men valdi at boksa út. Tíverri fyri hann, boksaði hann bóltin beint til Klæmint A. Olsen, og so hevði rituvíkingurin skorað tað fyrsta av sínum trimum málum í gjár.

Áðrenn fyrri hálvleikur var hálvrunnin, var longu 3-0, og longu tá var dysturin í veruleikanum avgjørdur, tí 07 Vestur hevði snøgt sagt einki sum helst at bjóða. At NSÍ so eisini fekk tvey skjót mál beint eftir steðgin, drap síðsta dropan av spenningi, og nú gjørdist tað mest eitt spæl, har spurningurin var, hvussu nógv mál kundu koma – og um tað blivu teir somu, sum skoraðu, ella aðrir eisini hildu seg framat.

Sum so ofta, tá so er, løgdu summir ov nógv fyri og megnaðu ikki at skora, meðan aðrir kundu koma sera lættliga til síni mál. Her var bara at royna seg, tí mestsum eingin verja var fyri. Onkur av málunum gjørdust tí øgiliga bílig og løtt, men tað hoyrir vælsaktans bara til, tá munurin í allar mátar verður so stórur, sum hann var tað við Løkin í gjár. Klassamunur er næstan ikki orðið.

## Sum dagur og nátt

Skal takast samanum, so kann NSÍ nokk ikki brúka stórsigurin til annað enn at styrkja sær málúrtøkuna, ið ikki plagar at vera sterkasta vápnið. Spælið gekk væl hjá liðnum, og sum tað leið út á dystin, kundu spælararnir næstan vera líkaglaðir við, um teir gjørdu feilir og mistøk, tí einki av slíkum bleiv revsað. Síðsti hálvi tímin fekk veruliga í »slow motion«, so tað vóru ikki pøstir NSÍ-arar, ið endaðu undir brúsuni aftaná.

Fleiri, ið eisini høvdu sæð 07 Vestur ímóti Víkingi fyri viku síðani, trúðu ikki sínum egnu eygum, tí avrikini vóru sum dagur og nátt. Sjálvandi var ikki hugaligt at fáa mótgongd beinanvegin, og tað at NSÍ longu var á odda 2-0 eftir góðar 20 minuttir, gjørdi ikki uppgávuna lættari. Kanska var uppleggið hjá 07 Vestur í so bragdligt, men hetta er væl tað, ið kann henda hjá einum uppfluttum liði, ið enn ikki hevur stabiliserað seg.

Ella, sum vágamaðurin tók til, at tað var frægari at fáa útpurringina nú enn í næsta landskappingardystinum, tí tá skal 07 Vestur á heimavølli taka ímóti B71, sum púra óvæntað vann á ÍF í Fuglafirði. ÍF skal næstu ferð til Runavíkar at spæla ímóti NSÍ.

hilmarjan@sosialurin.fo